# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Samkoman Kedron:

## Annarleiðis barnaarbeiði




TÍÐINDASKRIV

Samkoman Kedron í Vágum fer sunnudagin undir eitt annarleiðis barnaarbeiði í Sørvági. Sunnudagsskúlin verður fluttur úr Kedron yvir í Húsmøðrafelagshúsini,har byrjað verður kl. 11 sunnudagin 22.oktober.

Hetta slagið av sunnudagsskúla er komið úr USA og Norra, verður kallað ”Promiceland”, Lyftisland á Føroyskum.

Tímin verður býttur í fýra partar, byrjað verður við spæli t.d. fótbóltspæli, bob,hularingum, hoppibandi, trambolin o.a. síðan verður ein kreativ søga søgd við sjónleiki, dukkuteatur, drama ella máling. Her verður boðskapurin úr orðtøkunum. So verður sangur, har vit eisini fara at royna okkum á ein øðrvísi hátt.

Farið verður síðan í smærri bólkar, har eitt vaksi fólk fer at forklára boðskapin úr søguni til dagin í dag. Eisini er gott, at tey ungu vera aktiverað í barnaarbeiðnum sum hjálparar.

Vit gleða okkum sera nógv at byrja og vóna og biða eftir at nógv fara at koma. Nú sunnudagin kl. 11 byrjar BØRN MØTAST í Húsmøðrafelagshúsinum.

Borð Harrans verður í Kedron kl 11. kl 12-12.30 verður ábit, og Kl 12.30 byrjar familjumøti. Verið hjartaliga vælkomin.

Sosialurin

## Mása og Gutti Kallsberg 70 ár



22. og 24. oktober fylla Mása og Gutti Kallsberg á Viðareiði 70 ár.

Gutti er klaksvíkingur og Mása er ættað úr Vági. Sum ung vóru tey virkin ítróttarfólk, hann spældi við KÍ í mong ár, og hon spældi hondbólt við VB í fleiri ár.

Tey vóru ung, tá tey fóru til Danmarkar at ganga í skúla. Í 1960 fluttu tey til Klaksvíkar og giftust í 1961. Tey eiga trý børn: Karin, sum býr í Vági, og Gunnar og Elsebeth, sum bæði búgva í Klaksvík. Barnabørnini eru 9 í tali.

Í 1973 flutti familjan til Viðareiðis at búgva. Gutti arbeiddi hjá J.F. Kjølbro í 27 ár. Síðan fór hann til skips.

Í 18 ár sigldi hann sum kokkur við tangabátinum Magn hjá Føroya Shell, til hann gavst fyri einum ári síðani.

Mása hevur arbeitt í nógv ár á flakavirkinum Kósini. Tey seinastu árini arbeiddi hon á Norðfisk í Árnafirði til virkið har lat aftur.

Føðingardagarnir verða hildnir hjá dóttrini í Klaksvík leygardagin 22. oktober.

Vit ynskja teimum tillukku.

**Børnini**

## Niels Jacob keypt PhotoCare

**Mánadagin 16. oktober læt fotohandilin PhotoCare í Dr. Jacobsensgøtu í Havn upp við nýggjum eigara**

Tað er Niels Jacob Heinesen í Havn, sum hevur keypt PhotoCare frá Sp/f Myndir v. Trónda Joensen.

Niels Jákup yvirtók handilin 26. september, og hevur hann síðan gjørt fleiri umvælingar og broytt handilin soleiðis, at hølini nú er rúmligari, ljósari og meira kundavinarlig, eins og vøruúrvali eisini er størri.

Niels Jákup, sum bæði er útbúgvin fotohandlari og goymslumaður, hevur arbeitt innan hesi bæði øki í nógv ár. Hann lærdi til fotohandlara í SMS-foto, og til goymslumann hjá P/f Auto Service. Hann hevur altíð havt ein dreym um at byrja við síni egnu fyritøku, og nú gjørdist hetta veruleiki við PhotoCare.

PhotoCare er ein nútímans fotohandil við øllum tí sum har til hoyrir sum t.d. framkalling av myndum og myndaviðgerð við framkomnari útgerð.




*Niels Jacob Heinesen hevur keypt PhotoCare í Dr. Jacobsensgøtu í Havn*
*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



Altíð tað nýggjasta

www. sosialurin.fo